## Leggur ikki uppí

Almanna- og heilsumálaráðið fer ikki at leggja seg út í kjakið millum Vestmanna kommunu og Kvívíkar kommunu um, hvar best er at byggja felags ellis- og røktarheimið. Vestmanna kommuna heldur uppá, at heimið skal byggjast á Grønanesi, men Kvívíkar kommuna vil hava heimið bygt á Stykkinum. Poul Gert Hansen, aðalstjóri, sigur við Útvarpið, at almanna og heilsumálaráðið fer ikki at leggja seg út í trætuna.

## Archibald í Leikalund

Fríggjadagin 13. apríl kl. 16 letur listamaðurin Archibald Black upp framsýning í Leikalund í Klaksvík. Hetta er hansara triðja framsýning í gomlu handilshúsunum í Klaksvík, sum nú eita Leikalund. Á framsýningini hesaferð sýnir Archibald Black fram sínar nýggjastu oljumálningar. Til ferniseringina, sum verður fríggjadagin kl. 16, fer Karl Martin Samuelsen at syngja og spæla. Framsýningin í Leikalund er opin til 3. mai.




*Fóðrið frá MBM er væl umtókt – og haraftrat gott*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Við fóðrinum út til føroysku bøndurnir

**Mortan Poulsen av Signabø arbeiðir vanliga inni á goymsluni hjá MBM-Fóður í Hoyvík. Av og á fer hann tó runt landið og koyrir hetta sama fóðrið út til bøndurnir. – Hetta er gott til eina avveksling, sigur Mortan. Í páskavikuni hittu vit hann og stóra fóðurbilin á Velbastað.**

BØNDUR

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Velbastaður:** Eitt sum henda bygdin í Tórshavnar Kommunu er vorðin kend fyri, eru tey mongu fjósini og bóndagarðarnir.

Mitt í bygdini liggur eitt fjós beint í vegin, og frammanfyri tað stendur ein stórur tangabilur hjá MBM, sum er ein stytting fyri Meginfelag Búnaðarmanna.

Bilførarin er komin higar, tí hann skal lata nøkur tons av fóðri til bóndan. Hetta er ikki bara sum at siga tað, tí neyðugt er at bakka stóra tangabilin niðan eina lítla og smala brekku, fyri at koma so nær til fóðursilo'ina sum gjørligt.

Hóast hetta ikki hevði verið eins lætt hjá øllum at gjørt, er líkt til at Mortan hevur ta neyðugu royndina í slíkum manereringum.

Eftir lítlari løtu hevur hann fingið bilin uppá pláss, og fer beinanvegin at gera ta einu slanguna klára. Gjøgnum hesa slanguna verður samband fingið við eitt rør í fjósinum, hagar fóðrið skal.

Hann tryggjar sær at slangan er forbundin rætt á báðum støðum, og setur síðani motorin í gongd, sum skal blása fóðrið inn í silo'ina.

Løtu seinni hoyrist, at gongd er komin á veitingina av fóðrinum. Í hesum føri skulu sjey tons latast bóndanum.

– Hetta tekur ein hálvan tíma ella so, sigur Mortan við Sosialin.

### Har fóðrið fer

Mortan starvast vanliga sum goymslufólk innan ta deildina hjá MBM, ið tey nevna Búrøkt.

Á goymsluni tekur hann sær millum annað av at avgreiða teir innkomnu bíleggingar frá viðskiftafólkunum, sum eru at finna kring alt landið.

Men av og á tekur hann við øðrum avbjóðingum í starvinum:

– Tað er kortini altíð áhugavert at síggja, hvar alt fóðrið, sum vit selja, fer, sigur Mortan við einum brosi.

Um páskirnar var tann fasti bilførarin farin í frí, og í slíkum føri, plagar Mortan at loysa hann av.

Fyrrapartin henda týsdagin lá leiðin altso til Velbastaðar. Dagin eftir skuldi hann vestur í Vágarnar við fullum tangabili, har fleiri bøndur hava bílagt sær fóður, nú høgtíðin stundaði til.